# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 24. februar 2010




Cacau stútar framúr væl í spanska netið. Fyri steðgin sat Stuttgart á øllum, og tað vildi als ikki verið órættvíst, um teir vóru á odda við trimum málum í steðginum

Mynd: Polfoto/AP

# Barca var á halanum

**Týska Stuttgart hevði í ein tíma fullkomið tamarhalda á einum sera tomum Barcelona. Men tá Zlatan Ibrahimovic sendi bóltin í týska netið, koppaði dysturin**



jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk

Serfrøðingarnir eru á einum máli. Barcelona spældi í gjár sín vánaligasta hálvleik í fleiri ár, tá teir á útivølli royndu seg móti VfB Stuttgart.

Møguleikar trutu ikki, og í minst tveimum førum kendu vertirnir seg snýttar fyri brotsspark. Men tað gjørdist bara til tað eina málið, sum Cacau stútaði í netið í fyrra hálvleiki.

Heimaáskoðararnir mundu vóna, at trýstið hjá heimaliðnum fór at geva úrslit fyrr ella seinni, men ístaðin var tað eitt hamskift Barcelona, sum kom út eftir steðgin.

Henry varð sendur á vøllin fyri ein illa spælandi Toure, og tá Zlatan Ibrahimovic fekk potað bóltin fram við Jens Lehmann, koppaði uppgerðin fullkomuliga. Brádliga var Barcelona aftur bólttrygga liðið, sum støðugt koyrdi bóltin runt í egnari røð, og hóast teir ikki megnaðu at avgera dystin, so er javnleikurin eitt fínt útgangsstøðið undan returdystinum á Camp Nou. Og í øllum førum eitt munandi betri úrslit, enn tað, sum ábendingar vóru um fyri steðgin, tá tað als ikki hevði verið órættvíst, um máltalvan vísti 3-0 ella har á leið.

Í hinum dystinum í gjárkvøldið eydnaðist tað fronsku meistarunum úr Bordaux at vinna 1-0 móti Olympiakos. Einasta málið stútaði Cani í netið eftir frísparksinnlegg dygst undan steðginum.

## Champions League

**Týskvøldið**

| | |
|---|---|
| Olympiakos-Bordeaux | 0-1 |
| Stuttgart-Barceloan | 1-1 |

**Mikukvøldið**

CSKA Noskva-Sevilla (TV2 Sport)

Inter-Chelsea (3+)

# Stórsteypadystur í mars

**Fótbóltssambandið og Lions Club skipa tann 14. mars fyri árliga stórsteypadystinum**

Hetta er dysturin millum meistararnar og steypavinnararnar í føroyskum mansfótbólti, og í ár verður dysturin soleiðis millum HB og Víking.

Dysturin verður spældur á ovara vølli í Gundadali í Havn, og tað verður altso sunnudagin 14. mars klokkan 14.

Ágóðin av atgongumerkjasøluni fer óskedur til vælgerðararbeiðið hjá Lions Club.

**mørk**



**Meistararnir úr HB og steypavinnararnir úr Víkingi hittast tann 14. mars í stórsteypadystinum**

# Rooney brúkar høvdið

**Wayne Rooney er ikki til at steðga. Hann skoraði tvær ferðir í gjárkvøldi, tá Manchester United á Old Trafford vann 3-0 á West Ham**



argetrondur@ofir.dk

Tróndur Arge

Stutt fyri hálvleik fór West Ham í álop. Teir mistu bóltin langt uppi á Manchester United hálvuni, og so gekk tað skjótt hinvegin. Bólturin endaði hjá Dimitar Berbatov, sum legði eina høga avlevering til Valencia. Við fyrstu bóltrøringini legði Valencia bóltin innfyri til Wayne Rooney, sum stútaði bóltin í málið. Tíggju minuttir inn í seinna hálvleik endurtóku Valencia og Rooney kunstin. Valencia sendi bóltin innfyri til Rooney, sum enn eina ferð kundi stúta bóltin í málið. Hetta er fjórðu ferð á rað, at Rooney skorar við høvdinum.

Tað var ikki fyrr enn Rooney bleiv skiftur út, at hinir sluppu framat. Tá var tað maðurin, ið kom inn fyri Rooney, sum skoraði. Paul Scholes spældi Michael Owen leysan í brotssteiginum, og hann takkaði fyri álitið og skoraði. Hetta er fyrsta málið hjá Owen síðani hann avgjørdi grannauppgerðina móti Manchester City.

Manchester United er nú bara eitt stig aftanfyri Chelsea í Premier League, men United hevur spælt ein dyst fleiri. Chelsea skal í kvøld spæla móti Inter í Champions League.

West Ham er nummar 13 við 27 stigum. Tað eru fýra fleiri enn Bolton og Burnley, sum liggja hinumegin niðurflytingarstrikuna, men tey hava spælt ein dyst færri enn West Ham.